# Dagtilboðið Heildin – Samandráttur frá eftirlitinum

Dagtilboðið Heildin er ætlað vaksnum borgarum við seinheilaskaða. Eftirlitið hesaferð fevnir um trivnað og menning, fakligt arbeiðslag, arbeiðshættir, samsvar millum ætlan og praksis, og organisatión og leiðslu. Skjøl og samrøður við borgarar, starvsfólk og avvarðandi vísa eina greiða mynd av einum vælskipaðum og fakligum góðum tilboði. Dagtilboðið rúmar í løtuni 20 borgarum.

**Trivnaður og menning**
Eftirlitið vísir, at flest allir borgarar hava ein tryggan og innihaldsríkan gerandisdag við fjølbroyttum virksemi, sum gevur bæði sosiala, kensluliga og kropsliga menning. Borgararnir uppliva starvsfólkini sum nærverandi, fyrikomandi og fakliga dugnalig, og kenna seg hoyrdar og virdar, m.a. við borgarafundum og dagligum samskifti. Samstundis sæst, at einstakir borgarar, sum hava størri tørv á stuðli, hava tað trupult í einum so stórum tilboði, og trivnaðurin hjá hesum borgarum, er ikki eins góður sum hjá meirilutanum.

**Fakliga støðið hjá starvsfólkunum**
Starvsfólkini arbeiða við einum fakligum og relationsgrundaðum arbeiðslagi, har dentur verður lagdur á tryggleika, virðing og stuðul. Fakligi førleikin og samstarvi millum starvsfólkini, gevur eina samanhangandi tilgongd í gerandisdegnum, og starvsfólkini sýna eina jaliga menniskjaáskoðan og ábyrgdarkenslu. Skjølini vísa, at starvsfólkini átaka sær uppgávur, sum eru uttanfyri vanligar arbeiðsuppgávur, og at hetta hevur stóran týdning fyri borgararnar.

**Arbeiðshættir og háttalag**
Arbeiðslagið er viðurkennandi og lagað eftir førleikum og tørvi hjá borgarunum. Dentur verður lagdur á gerandisendurvenjing, felagsskap og uppgávur, sum varðveita og menna førleikar. Starvsfólkini arbeiða miðvíst fyri at skapa eina góða skipan, og borgararnir uppliva seg tryggar í dagligu rútmuni. Arbeiðshættirnir eru góðir í praksis, hóast nógv ikki er formliga fest á blað.

**At tænastan virkar sambært ætlan og virkisætlanir**
Arbeiðið við samstarvsavtalum er farið í gongd og skapar eina greiða kós í arbeiðinum, og ætlanin er, at allir borgarar skulu hava eina samstarvsavtalu.

**Organisatión og leiðsla**
Samstarvið millum starvsfólk og leiðara virkar væl í praksis, hóast ábyrgdarbýtið í síni heild, ikki er fest á blað. Arbeiðslagið tykist grundað á álit, gott samskifti og felags fakligari kós, og organisatiónin hongur væl saman í dagliga virkseminum.

**Tilmælir og áheitanir frá Eftirlitinum**

Í sambandi við eftirlitsvitjanina gav Eftirlitið Almannaverkinum fylgjandi tilmælir:

*Mælt verður Almannaverkinum til at umhugsað, um eitt annað tilboð skal stovnast afturat, ið er minni, og har fleiri starvsfólk eru tøk.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Almannaverkið hevur, við støði í verandi tørvi, avgjørt at uppnormera Heildina við einum starvsfólki. Almannaverkið fer tó at umhugsa, um tað er neyðugt at stovna eitt tilboð afturat.

*Mælt verður Almanna– og heilsumálaráðnum til at umhugsa, um ein tvørgangandi depil fyri seinheilaskaða skuldi verið settur á stovn, ið savnar t.d. læknavitan, námsfrøði og hjálp til avvarðandi.*

**Almanna- og heilsumálaráðið viðmerkir**
Almanna- og heilsumálaráðið tekur tilmæli við í víðari arbeiði á økinum.

*Mælt verður tilboðnum til at gera samstarvsavtalur við allar borgarar.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Tilgongdin at gera samstarvsavtalur við allar borgarar er byrjað.

*Mælt verður til, at Almannaverkið veitir fakliga vitan innan seinheilaskaða, afasi og neuronámsfrøði.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Almannaverkið hevur gjørt avtalu við Klaksvíkar Sjúkrahús um undirvísing innan seinheilaskaða. Almannaverkið fer at tryggja tætt samstarv ímillum eindirnar, so starvsfólkini í Heildini eisini fáa ta vitan, teimum tørvar innan seinheilaskaða, afasi og neuronámsfrøði.

*Mælt verður tilboðnum til at fáa stóru vitanina, sum fyrstu starvsfólkini hava uppbygt, festa niður á blað.*

**Almannaverkið viðmerkir**
Farið verður undir at skipa so fyri, at vitanin verður skjalfest.

*Eingin áheitan verður givin.*